## Smyril Line International Sea Angling Cup:

# Teir fyrstu fiskarnir veiddir

**Seinnapartin týsdagin komu so teir fyrstu fiskarnir, sum veiddir eru í altjóða fiskikappingini, upp á land á havnalagnum hjá Runavíkar havn. Væl av fólki var á bryggjuni og tók ímóti, og rættiligur stevnudámur var yvir økinum**

FISKIKAPPING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsmorgunin fór altjóða fiskikappingin – Smyril Line International Sea Angling Cup – av bakkastokki í Runavík. Tá løgdu 60 spentir havfiskarar, sum teir verða róptir, úr átta ymiskum londum til brots umborð sjey føroyskum bátum, sum vanliga sigla við ferðafólki í Føroyum.

Tá ið luttakararnir høvdu fingið tal á ryggin og matpakkar útflýggjaðar, ljóðaði lúðurin, og bátarnir løgdu frá landi.

Sosialurin var fram við á bryggjuni seinnapartin týsdagin, tá ið bátarnir við fiskimonnunum vóru komnir aftur at landi.

Væl av fólki var á bryggjuni, og rættiligur stevnudámur var yvir økinum.

### Tiltøk í tjaldinum

Tjald er sett upp í sambandi við tiltakið, og har er ymiskt á skránni.

Tveir útbjóðarar av fiskiútgerð, Jógvan Weihe og Teymavirkið, hava sølubásar í tjaldinum, og Diana Borgnyardóttir hevur bás við ullavørum.

Eisini er matsøla og søla av onkrum leskandi.

Aftrat hesum, hava Kunningarstovan í Saltangará og Ferðaráð Føroya bás við upplýsandi tilfari um Føroyar.

Á eini talvu kanst tú fylgja við, hvussu luttakarunum í kappingini gongst at fiska.

Hendan fyrsta dagin, høvdu teir 60 luttakararnir í Smyril Line International Sea Angling Cup fingið upp í tvey kør av ókruvdum fiski.

Onkur, sum var á bryggjuni í gjár, helt fyri, um hetta nú var tað stóra at reypa av – at 60 fólk, sum eru roynd í slíkum kappingum, høvdu fingið hesa fiskanøgd.

- Ein eldri útróðrarmaður var á Fiskamarknaðinum fyri løtu síðan við næstan einum fullum kari av snørisfiski á Lambavík, segði hesin, sum kom fram við.




*Fongurin í gjár, tvey kør at kalla full við ókruvdum fiski – mest toski, hýsu, upsa, brosmu og longu. Onkur reyðfiskur er ímillum. Størsti fongurin var longan*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Royndir við tráðuni

Fleiri av teimum, sum eru við í hesi kapping, hava luttikið í mongum slíkum kappingum kring um heimin.

Talan er um sokallaði lið, sum eru her heima og fiska, men í kappingini, sum Smyril Line stendur fyri, kunnu bert tvey og tvey kappast saman.

Millum luttakararnar er eisini onkur einstøk kvinna, og onkur av monnunum er farin um tey sjeyti.

Til tess at eggja skiparunum, sum eru við føroysku bátunum, at taka kappingina í álvara og soleiðis vera viðvirkandi til, at tey luttakandi skulu fáa sum mest burtur úr, fær vinnandi skiparin eisini virðisløn.

Hetta halda tey luttakandi vera positivt.

Tað er nevniliga skiparin, sum ger av, hvar leiðin gongur.

Stórar virðislønir verða lætnar teimum, sum gerast vinnarar av kappingini.






*Fólk kunnu keypa sær upp í ein posa av fiski fyri ein 50 krónuseðil. Restin fer til vælgerandi endamál í økinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Longan størst

Í kappingini ræður um at fáa størsta fiskin, størstu nøgdirnar, og tað telir eisini, at fleiri ymisk fiskasløg eru uppi í veiðini.

Sum luttakari hevur tú bert eina ávísa nøgd av agni.

Í báðum kørunum á bryggjuni í gjár vóru ymisk fiskasløg, eitt nú toskur, hýsa, upsi, brosma og longa – og onkur reyðfiskur var eisini uppi í veiðini.

Sum greipingarfiskur, var slagið ríkiliga gott. Lítið var uppi í av heilt smáum, og tað er ivaleyst tí, at smái fiskurin verður sleptur útaftur. Mát er nevniliga fyri, hvussu smá ymisku fiskasløgini kunnu vera fyri at telja við í kappingini.

Størsti fiskurin, sum fiskimenninir fingu í gjár, var ein rímiliga stór longa sum tann eina myndin á síðuni vísir.

Longan lá í einum kassa fyri seg á bryggjuni.

### Ókruvdur fiskur

Laura Olsen, sum í fleiri ár starvaðist á Fiskamarknaði Føroya, stóð við kassarnar, tá ið vit vóru fram við.

Hon segði, at fólk høvdu høvi at keypa sær upp í eina posa av fiski fyri ein 50 krónuseðil.

- Restin av fiskinum verður latin til vælgerandi endamál her í økinum, legði hon aftrat.

Fiskurin í kørunum var ókruvdur. Skein sólin í gjár, hevði blot skjótt komið í – ikki minst tí, at rúgvan og vektin í kørunum er so stór og trýstir tað, sum liggur niðari.

Eitt hugskot kundi tí verið, at fiskurin stutt eftir heimkomuna varð kruvdur og kanska køldur. Tá hevði hann hildið sær so mikið longri og soleiðis verið betur egnaður til eitt nú frikadellir og knettir.

Liggur fiskurin ov leingi við gørnunum í um summarið, gerst hann skjótt bleytur og ringur at fáast við.

### Liðug hósdagin

Fiskikappingin heldur fram til og við hósdagin, tá ið farið verður á seinastu veiðiferðina á hesum sinni.

Loyst verður stundisliga,